# Veljarakanning á fartelefon

**Saman við ISUUS Mobile hevur Sosialurin seinastu dagarnar havt eina veljarakanning umvegis GSM-kervið**

TØKNI
*Jákup Mørk*

Í samband við val plaga kanningar av ymsum slag at verða gjørdar, og fólkatingsvalið hesaferð er einki undantak í so máta. Sonevndu quick-poll kanningarnar á alnetinum hava seinnu árini eisini verið partur av hesum, og nú er so enn ein nýggj kanning komin.

Hesaferð er møguleika at atkvøða umvegis fartelefon-neti. Við at senda ein SMS við lista-bókstavinum hjá einstøku flokkunum til 593000, ber til at taka lut í kanningini.

Tað er ISUUS Mobile við Regin Weihe Dalsgaard, sum stendur fyri skipanini, og sjálvur heldur Regin, at henda hevur fyrimunir framum vanliga quick-poll kanningarnar, sum javnan eru á netinum. Hetta tí tað í eini gsm-atkvøðugreiðslu ikki er gjørligt at verða upptikin fleiri ferðir. Forðingin fyri hesum í eini quick-poll á alnetinum er nevnliga ikki størri enn so, at brúkarin við at strika eina cookie kann atkvøða so ofta, sum honum lystir.

### Einastandi loysn

Men hetta at gera eina atkvøðugreiðslu á netinum er bara ein evarska lítil partur av tí, sum ISUUS fæst við. Seinnu árini hava teir ment eina serliga trívegis GSM-skipan. Tað vil siga eina skipan, har fyrispurningar av ymsum slag kunnu sendast til nummarið, og síðani verður svar sent aftur til brúkaran.

- Talan er um eina loysn, sum eingin annar í Føroyum ella Danmark kann veita í løtuni, sigur Regin.

Vit hava longu nakrar kundar bæði her og í Danmark. Eitt nú hevur Meinhardt Arge eina skipan, har tú við at senda sms við tíni nummarplátu á kanst fáa at vita, hvørt hesin er liðugur á verkstaðnum ella ikki. Somuleiðis hevur Solar Føroyar eina skipan, har síggjast kann, hvussu langt ávísur ordri er komin í skipanini.

### Fleiri fyrimunir

Í løtuni er Regin í Danmark, har ein roynd verður gjørd at koma inn á danska marknaðin.

- Her hava vit so valt, at okkara lutur skal vera sum supplering til skipanir, sum longu eru kendar. Eitt nú kann okkara skipan samstarva við Navision, og á tann hátt kunnu vit gerast eitt eyka amboð hjá fyritøkunum. Tað halda vit í øllum førum vera betri, enn at skula royna at trýsta stórar fyritøkur heilt av marknaðinum.

Sjálvur heldur Regin, at størsti fyrimunurin við teirra skipan er, at hon er nógv bíligari hjá kundanum, enn aðrar SMS-tænastur.

- Kappingarneytarnir hjá okkum eru fyrst og fremst tær tænastur, sum hava fýra tøl. T.d. 1441 í Føroyum. Í mun til hesar er okkara fyrst og fremst bíligari at keypa, og hevur tú fyrst keypt hana, kanst tú brúka hana sum tær lystir, uttan at skula rinda eyka fyri hetta. Hartil inniber eitt SMS til okkara tænastu ikki nakað eyka gjald fyri sendaran. Tað kostar tað sama, sum at senda eitt vanligt SMS, sigur Regin Weihe Dalsgaard at enda.




*Atkvøðugreiðslan, sum kann fylgjast á www.sosialurin.fo, er bara ein lítil partur av tí, sum ISUUS Mobile hevur at bjóða kundum sínum*

# Virksemi í Vági

**Yvirskriftin kann kanska tykjast einkisigandi, men hjá teimum, sum dagliga síggja tómar fermetrar av av bryggjuøki, er hetta viðkomandi og hjá øðrum kanska hugvekjandi**

VIRKSEMI
*Dagfinn Olsen, dagfinn@sosialurin.fo*

Nakað meira av virksemi hevur verið á bryggjuni í Vági hesa vikuna, enn vanligt er. Vanliga er nærum einki, men í vikuni hevur rættiliga verið lív í - eisini á nýggja bryggjuøkinum, djúphavnini, sum annars hevur ligið nýtt, stásasiligt, stórt og oyði.

Tvey russisk skip lógu nakrar dagar fyrst í vikuni við bryggju og umskipaðu. Sambært heimasíðuni hjá Suðurrás, sudurras.fo, var talan um felagið Faroe Cold Stores, sum hevur gjørt avtalu við russar um at nýta goymslubygningarnar, sum felagið eigur á bryggjuøkinum. Johan Dahl, stjóri í felagnum, sigur við heimasíðuna, at hann vónar at hetta er byrjanin til meira og støðugt virksemi.

### Suppluskip umvælt

Leygardagin kom eitt supplyskip hjá einum felag, sum Johan Dahl umboðar, á Vág. Skipið hevði fingið eina rivu framman og verður nú umvælt á Vágs Skipasmiðju. Í hesnum sambandi hevur eisini manningarskifti verið og mánadagin kom tyrlan av flogvøllinum á Vág við manning.



*Mynd: D. Olsen*

## "Góðir vanar" í Lívdini

**Hoyvík:** Henda seinasta mánaðin hava tey í samkomuni Lívdin víst limunum á, hvat ein góður vani er.

Á familjumøtunum hava tey higartil sagt frá, um góðar vanar í hjúnabandinum, familjuni og í samkomuni. Hesi møti byrja kl. 10:30 og vara í eina tíma, og síðani verður hildið fram kl. 12 við tilbiðjan og læru.

Komandi sunnudag verður so aftur eitt slíkt evni tikið upp við familjumøtið. Tá fer Jákup Jacobsen at tosa um eitt evni, ið helst hevur áhuga hjá mongum, nevniliga "Góðir vanar í arbeiði". Eftir hesa framløguna fer Jógvan Zachariassen at tosa um Guds mátt.

Lívdin er ein evangelisk samkoma í Hoyvík, sum byrjaði at halda reglulig møtir 26. august í 2001. Møtini eru í Hoyvíkar skúla

Tey leggja stóran dent á, at øll skula kenna seg vælkomin í samkomuni, óansæð úr hvørji samkomu ella kirkju, ein er, ella hvørja bakgrund ella andaliga støðu ein er í.
*sb.*

## Sangskeið aftur í heyst

**Nesvík:** Er tað nakað sum tey sangglaðu í Heimamissiónini gleða seg til, so er tað árliga sangskeiðið. Hetta skeiðið verður hildið í heystfrítíðini á hvørjum ári í Leguhúsinum í Nesvík, har útivið 200 fólk í øllum aldri savnast til sang, bíbil og bøn.

Fyrireikingarnar til ársins sangskeið eru longu byrjaðar, og nú er greitt, at tað verður danin Ole Mouritsen sum verður lærari og fer at stjórna tí stóra kórinum.

Hann starvast í løtuni sum tónleikalærari við bíbliuskúlan í Børkop, men hevur altso sett eina viku av til eina Føroya-vitjan í oktober mánaði.

Hann er tó ikki ókendur við føroyingar og føroysk viðurskifti. Ole var eitt ár við bólkinum Impuls, har hann og Ásbjørn Berthelsen av Strondum ferðaðust runt í Danmark og evangeliseraðu við sangi og tónleiki. Ta ferðina vóru tey eisini á vitjan í Føroyum.
*sb.*